Uppgáva til næmingin

Hon, sum róði eftir ælaboganum - uppgávur



Rakel Helmsdal

Hon, sum róði eftir ælaboganum

Perma: Áslaug Jónsdóttir

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2014

NÁM

Áðrenn vit lesa

Hygg eftir permuni og svara hesum spurningum:

Framman:
Hvat sært tú?
Hvør er á permuni?
Hvar er persónurin staddur?
Hví?
Hvønn týdning kann orðið ælabogi hava?

Aftan:
Hvat sært tú?
Hvør er á myndini?
Hvar er persónurin?
Hvat man hon ætla sær?
Lesið tekstin og prátið um, hvat bókin man fara at vera um?

Innaní:
Lesið bíbliuørindi og tosið um, hvat tað merkir.
Lurtið eftir Enigma Variations eftir Edward Elgar.
Finn 5-6 ymisk lýsingarorð, sum lýsa hugløgini í tónleikinum. Skriva niður, nær huglagið skiftir.

https://www.youtube.com/watch?v=SvA6FtN8-n0

Meðan vit lesa:

Tú fært 3 minuttir.
Hvat festi tú teg við í hesum partinum? Skriva stikkorð:

1. partur:

2. partur:

3. partur:

4. partur:

5. partur:

6. partur:

7. partur:

8. partur:

9. partur:

10. partur:

11. partur:

12. partur:

13. partur:

14. partur:

15. partur:

Tá ið vit hava lisið:

Lesiringar

Lærarin gevur tykkum hvør sín leiklut. Finn upplýsingarnar, sum tú hevur fingið boð um, og luta tað við tín lesiring. Hini gera tað sama.

Haldið áfram í somu lesiringum. Viðgerið hesar spurningar:

1. Lýs persónarnar: Argantael (s. 68-69), Lýs Dagan (s.35 og 81), Morganu (s. 70-71), Enu (s. 83-95), og Sebastian (s. 11, 51, 55). Munnu nøvnini á persónunum hava týdning? Kunnu tey merkja nakað?
2. Greið frá, hvat myndin við býflugunum og hunangskøkuni (s. 68) merkir, og greið frá, hví Argantael følir seg spitalska.
3. Greið frá, hvat myndin við Móses (s. 69) merkir.
4. Hví heldur tú, at Morgana sigur: “Eg eri Morgana”? (s. 74).
5. Hví eitur bókin Hon sum róði eftir ælaboganum?
6. Hvat fekst tú burturúr søguni? Hvørjum spurningum situr tú eftir við? Kundi søgan endað øðrvísi?

At seta í frásjón. Leggið fram og kjakist í flokkinum.

1. Greið frá afturvendandi evnum í bókini, nevn dømi um afturvendandi evni úr søguni.
2. Kennir tú aðrar tekstir, sum hava somu afturvendandi evni?
3. Kennir tú aðrar tekstir, sum eru skrivaðir í sama tíðarskeiði? Hvussu líkjast teir? Hvussu líkjast teir ikki?
4. Hvussu hóskar søgan til samfelagið, vit liva í í dag? Hvørjar samfelagsstættir hoyra vit um? Er munur á gerandisdegnum hjá teimum ungu? Rík/fátæk? Líkist hetta gerandisdegnum hjá teimum ungu í dag? Kundu hendingarnar farið fram nú? Hví? Hví ikki?
5. Hevur Rakel Helmsdal skrivað aðrar søgur? Hvussu líkist tað/líkist tað ikki hesum tekstinum?

Spurningar til rithøvundan.

Skrivið niður spurningar, sum tit kundu hugsað tykkum at spurt rithøvundan.

Til stuttleika:
Á www.kahoot.com liggur ein quiz við spurningum úr Hon sum róði eftir ælaboganum. Hetta eru spurningar, har svarini eru at finna á reglunum. Quizin eigur ikki at vera berandi í arbeiðinum við skaldsøguni, men kann nýtast sum eitt stuttligt íkast. Tit finna hana við at leita eftir Hon sum róði eftir ælaboganum, og tað er brúkarin liv.magnussen, sum hevur gjørt hana.